

*Vit sigla móti lítlari havn sunnanvert Helsingborg*
*mynd: Grækaris*



*Hvar er vindurin? Regin, Preben, Simme og Hans*
*mynd: Grækaris*



*Við døgurðaborðið umborð á Galatheu*
*mynd: Grækaris*



*Grækaris repar*
*mynd: Simme*



*Vit eru í skúla. Regin Joensen setir út í kortið*
*mynd: Grækaris*



*Simme við harmonikuni eftir morgunmatin á Ven*
*mynd: Grækaris*



*Hans Korsgaard tekur skiparastarvið í álvara*
*mynd: Grækaris*



*Simme slappar av við krossorðagátum*
*mynd: Grækaris*



*Matstovan á Flackfortinum*
*mynd: Grækaris*



*Sólsetur á Ven*
*mynd: Simme*

Danmark, men sambært søgufrøðingum hevur Ven verið partur av Svøríki síðan 1654.

## Úr havn í havn

Morgunin eftir, tá morgunmaturin er farin niðurum, er tónleikur á bryggjuni á Ven. Simme hevur funnið harmonikuna fram, og tónarnir fara flúgvandi út millum fólk, sum ganga framvið. Fleiri steðga, og lýða á hugnaligu tónarnar. Og soleiðis gongur restin av vikuni. Frálæra fyrrapart, sigling seinnapart, og hugni – við harmoniku og sangi um kvøldið.

Av Ven leggja vit kósina móti Helsingør. Haðani til Helsingborg. Síðan leggja vit at landi í øðrum smáum svenskum havnum, áðrenn leiðin varð løgd móti "gjørdu" oynni Flackfortet, sum liggur lutfalsliga stutt út fyri Keypmannahavn.

Sum vit sigla hendan dagin, miðskeiðis í Oyrasundi, fer eitt kent skip fram við okkum, gamla Norrøna. Tað fer eitt suð ígjøgnum okkum føroyingar hesa løtuna. Hon sigur okkum eitt ella annað, gamla Norrøna. Vit hava allir havt okkara góðu upplivingar umborð á henni. Hon ímyndar nakað gott, nakað jaligt, sum ongin okkara dugir at seta orð á. Erriskap av onkrum slagi, kanska. Hetta, okkara fyrrverandi flaggskip.

Aftur hendan dagin gera vit fleiri venjingar, serliga mann yvir borð-venjingar. Meiningin er jú, at vit skulu kunna gera alt við seglum, og uttan motor.

Um sekstíðina hetta kvøldið stevna vit inn í havnina á Flackfortet. Oynna, sum danska verjan lat gera frá 1910 til 1914. Oyggin var gjørd sum liður í at verja Keypmannahavn, og herurin nýtti hana heilt fram til 1968. Á oynni er reistur ein stórur bygningur við einari ørgrynni av gongjum, og pláss var á sinni fyri 550 hermennum.

Í dag eigur ein svii Flackfortet, og hon verður nýtt sum ferðamál burturav. Her er handil, ein framkomin matstova, minigolf, ein rúgva av grillum, sum vitjandi kunnu nýta, og mangt annað.

Eftir at hava gingið ein túr á spennandi oynni, endaði eisini hetta kvøldið við harmonikutónleiki og sangi. Tað var heppið fyri okkum allar, at hava ein tónleikara sum Simma við okkum umborð.

Dagin eftir, sunnudagin, var próvtøkudagur. Og próvtøkan snúi seg bæði um tað bókliga og tað praktiska, t.e. sigling við seglum, mann yvir borð roydnir o.s.fr. Og burtur sæð frá tí, at veðrið var um at forkoma royndini (í minna lagi av vindi) gekk bara væl. Allir fingu dugnaskaparprógv – eisini í sigling.